

**CITROEN BERLINGO 1,9** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JU 526 **Km:** 50.000
**Árgangur:** 24.09.02

**Kr. 85.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA SEDAN**

**Skrásetingarnr:** ML 188 **Km:** 104.000
**Árgangur:** 02.10.01

**Kr. 78.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HV 385 **Km:** 47.000
**Árgangur:** 16.02.05

**Kr. 250.000,-**



**VW TRANSPORTER** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BV 413 **Km:** 165.000
**Árgangur:** 16.01.97 **Seinast sýnaður:** 11.01.05

**Kr. 45.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,0 H/B SOL 5D**

**Skrásetingarnr:** KT 493 **Km:** 53.500
**Árgangur:** 05.04.01

**Kr. 78.000,-**



**OPEL ASTRA 1,6 SEDAN**

**Skrásetingarnr:** NT 717 **Km:** 100.000
**Árgangur:** 02.12.98 **Seinast sýnaður:** 26.01.07

**Kr. 53.000,-**



**VOLVO S40 2,4** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UJ 914 **Km:** 13.000
**Árgangur:** 08.02.06 **Seinast sýnaður:** 08.02.06

**Kr. 340.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 D4-D TERRA SED** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BV 550 **Km:** 142.000
**Árgangur:** 01.11.00

**Kr. 118.000,-**



**TOYOTA COROLLA 2,0 LINEA TER. D-4D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TS 219 **Km:** 60.000
**Árgangur:** 21.02.03

**Kr. 148.000,-**



**MAZDA 6 1,8 SEDAN** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DR 325 **Km:** 31.000
**Árgangur:** 04.05.05

**Kr. 190.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.


# Fjarðafestivalur við svenskum Charizma



**Vit kunnu nú avdúka, at svenski bólkurin Charizma spælir á Fjarðafestivalinum í ár**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hóast bólkurin kanska ikki er so kendur á okkara leiðum, so er hetta ein royndur bólkur. Charizma gav fyrstu fløguna út í 1985. Bólkurin spældi tá sera harðan tungan málmrokk. Bólkurin hevur ment seg nógv síðan tá, og áskoðaratalið verður alsamt størri. Frá at spæla fyri nøkrum fáum áhoyrarum spæla teir nú vanliga fyri fleiri túsund. Stílurin er eisin broyttur og kann í dag mest kallast popprokkur. Charizma hevur spælt nógv og vunnið sær nógvan fjepparar í Eysturevropa, Í ár luttók bólkurin í Polsku Eurovisionkappingini. Charizma vann ikki kappingini, men teirra lag; Emily hevur klára seg væl kring Evropa. Fyrireikararnir siga, at tað er við spenningini, at teir hyggja fram ímóti at hoyra Charizma folda seg út á ársins Fjarðafestivali.

Les meiri um Charizma á www.myspace.com/charizmaonline

# Høgni Lisberg á Roskilde Festivalin

**Høgni Lisberg varð fríggjamorgunin váttaður sum fyrsta føroyska navnið á ársins Roskilde Festivali. Hann spælir á Pavillion Junior, ið er fyrsti pallurin, ið letur upp á festivalinum**

**TÓNLEIKUR**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg hevur seinastu tíðina gjørt alsamt meira vart við seg í Danmark. Hann verður javnan spældur í donskum útvarpi og luttók í síðstu vikuni í sjónvarpssendingini Go' Morgen Danmark. Hann verður mettur sum eitt av heilt bjørtu nýggju nøvnunum á danska tónleikapallinum. Tí er hansara navn á skránni fyri Roskilde Festivalin als ikki, nakað ið tekur okkum á planet.fo á bóli.

Í fjør spældi 200 á júst sama palli, sum Høgni nú spælir á tann sonevnda Pavillion Junior. Henda konsert gjørdist ein brakandi succes fyri bólkin, og hevur slóða fyri nógvum spælijobbum kring Norðurlond fyri punkbólkin. Men Høgni hevur sjálvur spælt á Pavillion Junior áður, tá sum trummuleikari aftan fyri Eivør og Petur Pólson í Clickhaze.

- Tað er feitt, hetta verður vónandi størsta publikum, sum eg havi spælt fyri við hesum projektinum. Eg síggi hetta sum ein góðan møguleika, og tað sær í øllum førum gott út á okkara C.V., at vit hava spælt á Roskilde Festivalinum. Eg vóni, at hetta gevur eitt útslag av onkrum slag, akkurát sum at spæla á Go' Morgen Danmark gav tað, segði Høgni, ið vit fangaðu í telefonini á veg umborð á flogfarið til Íslands har hann í vikuskiftinum skuldi luttak á AME-Reykjavík.

